Álit

í

løgtingsmáli nr. 3/2023: Uppskot til løgtingslóg um innflutning, framleiðslu og sølu av rúsdrekka (Rúsdrekkalógin)

Landsstýrismaðurin í lógarmálum, Bjarni K. Petersen, hevur lagt málið fram 23. august 2023, og eftir 1. viðgerð tann 5. september 2023 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 7., 12. og 19. september 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í heilsumálum, Margit Stórá, saman við Fólkaheilsustýrinum og landsstýrismannin í lógarmálum, Bjarna K. Petersen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar:

Ein minniluti (Jørgen Niclasen og Árni Skaale) hevur hesar viðmerkingar:
Lógaruppskotið er tað sama sum galdandi lóg, tó við smærri broytingum. Tann eina broytingin er prinsipiell, og hon er, at rúsdrekkaframleiðarar í framtíðini eisini kunnu selja sterkan løg til vitjandi, sum hava verið rundvísing á bryggjarínum. Sterkur løgur er í uppskotinum at skilja sum løgur við meira enn 5,8% av alkoholi í sær.

Í § 1 í lógini stendur at: “Endamálið við hesi løgtingslóg er at avmarka rúsdrekkanýtsluna.....”

Broytingin kann síggjast úr tveimum sjónarhornum. Annað er tann vinnuliga og hitt er, um broytingin er í ósamsvari við endamálsorðingina í lógini.

Vinnupolitiskt er uppskotið til fyrimunar fyri rúsdrekkaframleiðarar, men minnilutin heldur, at uppskotið er í ósamsvari við endamálsorðingina.

Gransking vísir, at atgongd og prísur eru amboð, sum ávirka nýtsluna. Við atgongd hava øll Norðurlond uttan Danmark og Grønland valt at hava einkarsølu av rúsdrekka. Hagtøl vísa, at í londunum við einkarsølu er nýtslan minni, enn hon er í Danmark og Grønlandi, har sølan er latin í handlarnar. Hetta vísir eins og granskingin, at atgongdin hevur týdning.

Í Føroyum kom einkarsøla í 1992, men tá varð gjørt eitt undantak. Tað er, at ølframleiðarar sjálvir kundu hava sølubúðir, sum seldu løg við upp til 5,8% av alkoholi í sær. Tøl vísa, at nýtslan í Føroyum er millum minstu nýtsluna í Norðurlondum. So nógv týðir upp á, at valið av okkara skipan hevur verið á rættari leið.

Nú vil landsstýrið gera enn fleiri undantøk frá einkarsøluprinsippinum. Eisini hevur landsstýrið boðað frá, at hetta er bara tað fyrsta uppskotið at bróta einkarsøluprinsippið.

Verður uppskotið samtykt, so verða beinanvegin fleiri sølustøð við sterkum løgi. Minnilutin vísir á, at tað víðkar atgongdina og er tí í ósamsvari við endamálið við lógini. Í fyrstu atløgu koma nøkur sølustøð afturat, men í roynd og veru gevur uppskotið møguleika fyri, at tað koma 20-30 ella fleiri

sølustød. Mikrobryggjarí fylla ikki nógv, so við lítlum rúmi við góðkendum køki hevur ein rætt til at vera sølustað. Tað metir minnilutin ikki vera í samsvari við endamálið við lógini.

Føroysku bryggjaríini hava í nógv ár útmerkað seg við at bjóða fram eina røð av øli, sum er undir 5,8%. Uttan iva er ein av orsøkunum, at tey sjálvi sleppa at selja tað og harvið forvinna meir uppá framleiðsluna.

Verður fyriliggjandi uppskot samtykt, er sannlíkt, at bryggjarríini fara at leggja størri dent á bjóða fram fleiri og fleiri sløg av sterkum, heldur enn fleiri sløg av veikum, sum gongdin hevur verið higartil.

Gransking vísir, at verður drukkin veikari løgur, er samlaða nøgdin av alkaholi minni. Minnilutin heldur tí, at hóast uppskotið er til fyrimunar fyri rúsdrekkavinnuna, so er uppskotið klárt í ósamsvari við endamálsorðingina í lógini.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Ein annar minniluti (Annika Olsen, Karlot Hergeirsson og Uni Holm Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:
Føroysku bryggjaríini og brennaríini eru vorðin væl umtókt ferðamál. Tey fáa støðugt fleiri fyrispurningar um virkisvitjanir frá fólki, serliga útlendingum, men eisini føroyingum, sum vilja fáa innlit í framleiðsluna, søguna og føroysku rávørurnar. Hetta hevur ment seg til at vera eitt vinnutilboð, og hesin minnilutin heldur tað fyrst og fremst vera eitt vinnuátak, at bryggjaríini og brennaríini sleppa at selja gestunum sína framleiðslu eftir einstøku vitjanirnar. Støðan er nú, at gestirnir verða vístir til Rúsdrekkasøluna, um tey vilja keypa vørurnar, sum tey frammanundan at hoyrt um og fingið neyvari innlit í. Við broytingini kunnu vinnuaktørar í Føroyum veita eitt frægari heildartilboð í hesum sambandi.

Sølan verður undir skipaðum og avmarkaðum kørmum. Hetta uppskotið hevur við sær, at loyvisnevndin fær heimild til at loyva framleiðarum at selja sína framleiðslu, sum er sterkari enn 5,8 rúmprosent av alkoholi, á framleiðslustaðnum í sambandi við gestavitjanir. Tað vil siga, at sølan av sterkari løgum verður ikki opin fyri almenninginum. Eftirlit skal vera við, at treytirnar fyri loyvinum verða útintar, og loyvisnevndin kann taka loyvið aftur, um treytirnar fyri loyvinum verða brotnar.

Eins og frammanundan verður heldur ikki loyvt at lýsa við rúsdrekkasølu, skeinking og útflýggjan, og við hesum uppskotinum verður forboðið eisini galdandi fyri lýsingar á talgildum miðlum, sum venda sær til fólk í Føroyum.

Í Føroyum skulu vit virka fyri at tálma rúsdrekkanýtsluna mest møguligt, og vit skulu hindra ovurnýtslu av rúsdrekka. Hesin minnilutin er av tí fatan, at hendan broytingin fer ikki at økja um nýtsluna. Grundgevingin er, at hetta eru í størstan mun serstakar og dýrar vørur, sum ikki økja um dagligu nýtsluna, atgongdin økist ikki stórvegis, og tað verða í flestu førum útlendingar, sum fara at brúka hetta tilboðið.

Tey, sum vilja keypa vørurnar, sum føroysku brennaríini og bryggjaríini selja, hava eisini frammanundan tann møguleikan í sølubúðunum hjá Rúsdrekkasølunum kring landið. Tað vil siga, at eingin fer at vitja brennaríini og bryggjaríini við tí einfalda endamáli at keypa vørurnar.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein triði minniluti (Erhard Joensen og Eyðdis Hartmann Niclasen) tekur støðu í tingsalinum.

Vinnunevndin, 4. oktober 2023

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstformaður	Eyðdis Hartmann Niclasen
Jørgen Niclasen	Árni Skaale	Uni Holm Johannesen
	Karlot Hergeirsson	